# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vaktarskifti

Bispavígslan í dómkirkjuni í gjár var ein stór og avgerandi hending í føroyskari kirkjusøgu. Fyri fyrstu ferð varð føroyskur bispur vígdur av føroyskum bispi. Hendingin markerar á sermerktan hátt, at fólkakirkjan nú er komin undir føroyskt málsræði. Sum kunnugt varð kirkjan yvirtikin á Ólavsøku, og nú kann staðfestast, at kirkjan sum almennur stovnur virkar, sum hann skal. Tað einasta, ið ein kanska kann finnast at, er, at yvirtøkan ikki er vorðin framd fyri langari tíð síðan. Men nú er hon so veruleiki, og stórur meiriluti av føroyingum taka undir við hesum.

Bispavígsla er ein stór og sera álvarsom hending. Bispur er so at siga fremsti andaligi leiðari í tjóðini. Tað liggur sostatt sera stór ábyrgd á tí persóni, ið verður kosin til bisp. Bispur er sjálvsagt ein av landsins hægstu embætismonnum og skal sum slíkur fyrisita almenna stovnin fólkakirkjuna. Men sjálv fólkakirkjan er sermerkt sum stovnur. Hon hevur sítt egna stýri og hevur óvanliga fríar ræsur m.a. verður virksemið í stóran mun fíggjað við serstøkum skatti, kirkjuskatti, sum allir limir hava skyldu at rinda. Her sostatt ein víðfevnd og mangan torgreidd fyrisiting, sum krevur dugnaskap og diplomatisk evni.

Hartil kemur sum nevnt, at bispur er andaligur leiðari. Í okkara sekulera samfelag er hetta alt annað enn lætt. Ein bispur kann velja at tiga ella hann kann velja at tala. Kynstrið er at vita, nær ein skal tala og nær ein skal tiga. Fráfarandi bispur hevur verið virðiligur og myndugur, men hann hevur sjáldan lagt seg út í orðaskifti um andligar spurningar. Nýggi bispur tykist meira opin og framfýsin og verður uttan iva ein góður andaligur og fyrisitingarliður leiðari. Hann er meira fólksligur, og tað er júst nakað, sum mong sakna í fólkakirkjuni. Tað er eingin løtt uppgáva, ið hann hevur átikið sær. Tað hevur alstóran týdning, at nýggi bispur fær stuðul frá landsins myndugleikum, frá prestunum og øllum kirkjufólkinum í sínum virksemi, so fólkakirkjan kemur styrkt burturúr tí broytingartilgongd, sum hon er hesi ár.

**Sosialurin**

# Málið um uppsøgdu skipararnir

**JACOB VESTERGAARD**
Fyrrv. landsstýrismaður



Tann 11. mai 2007 fáa Hanus Lassen og Pauli Larsen, skiparar á Smyrli at vita frá Strandfaraskipum Landsins, at teir skulu úr størvum sínum komandi ársskifti. Hetta tí, at báðir gerast 67 ár við árslok og hevur tað verið fráfaringaraldurin hjá alment settum síðan 1992.

Tó so, fleiri undantøk eru gjørd síðan 1992. Eisini fyri yvirmenn á skipum hjá Strandferðsluni.

Tann 16. oktober 2007 kemur Fíggjamálaráðið, sum varðar av almenna starvsfólka-politikkinum við nýggjum rundskrivi um fráfaringaraldur.

Rundskrivið fylgir landsstýrisins vilja, sum varð staðfestur á landsstýrisfundi frammanundan, og broytir fráfaringaraldurin til 70 ár, umframt at loyvt verður arbeiðsgevara, sum longu hevur sagt starvsfólki upp vegna 67 ára aldur, at søkja um loyvi at taka uppsøgnina aftur.

Hetta fyri at dugnalig og ábyrgdarfull starvsfólk, sum eru søgd upp, men ynskja at halda áfram í sínum starvi, skulu fáa møguleikan til tað, um arbeiðsgevarin tekur undir við tí.

Skipararnir hava síðan í summar tosað við stjóran um at halda fram, og dagin eftir rundskrivið søkja skipararnir á Smyrli í tráð við landsstýrisins vilja og fyrrnevnda rundskriv, stjóran á Strandferðsluni um loyvi at halda áfram.

Stjórin á Strandferðsluni sendir fyrispurningin til Fíggjarmálaráðið til viðmerkingar.

Tann 19. oktober 2007 svarar Fíggjamálaráðið, at umsóknin ikki kann verða gingin á møti. Grundgevingin er í stuttum tann, at Strandferðslan hevur lýst eftir nýggjum skiparum til Smyril.

Ongin hevur tó verið til samrøðu og ongin er settur.

Slík grundgeving er sambært løgfrøðiligu ráðgevingini í Innlendismálaráðnum ósaklig og uttan løgfrøðiligt hald, umframt at hon er beinleiðis í ansøgn við almenna starvsfólkapolitikkin, sum Fíggjarmálaráðið skal eitast at umsita.

Einki forðar einum arbeiðsgevara at taka eina starvslýsing aftur og avgera ikki at seta starvið. Heldur ikki um umsøkjarar hava verið til samrøðu.

Slíka niðurstøðu er Løgtingsins Umboðsmaður komin fram til í kærumáli um Løgmansssskrivstovuna.

Tíverri forðar hetta ikki fyrrverandi stjóranum á Strandferðsluni at halda fast við sína avgerð um at senda skipararnar til hús, og soleiðis at seta teirra rættartrygd í vanda.

Hesa ósakligu og løgfrøðiligu ógrundaðu støðu heldur stjórin, stuðlaður av Fíggjarmálaráðnum fast við fram til 9. november 2007, tá skipararnir á Smyrli kæra avgerðina hjá stjóranum til Innlendismálaráðið.

Henda møguleika hava skipararnir rætt til, og tað var mín ábyrgd og løgfrøðiliga skylda sum kærumyndugleiki at tryggja, at kæran fekk eina sakliga viðgerð og væl grundaða niðurstøðu.

Einhvør, sum kennir til fyrisitingarlig viðurskifti veit, at tað er vanligt at bíða við avgerðum í málum, sum á einhvønn hátt kunnu tengjast at einum kærumáli, ið er undir viðgerð hjá omanfyri liggjandi myndugleiki. Enn meira er hetta galdandi, tá tann, ið er kærdur hevur fingið boð um at bíða.

Um hetta mundið hevði stjórin á Strandferðsluni sett fyrra skiparastavið.

Tí fekk stjórin á Strandferðsluni boð um at bíða við at seta seinna skiparastarvið til kæran varð avgreið.

Hesum tænastuboðum, sum ein landsstýrismaður hevur fullan rætt at geva, lýðir stjórin ikki, tá hann 15. november setur seinna skiparan í starv.

Seinni sama dag fær stjórin seinni tænastuboðini frá undirritaða, har álagt verður stjóranum kalla setanina aftur og soleiðis rætta óheimilaðu avgerð sína í einum kærumáli hjá Innlendismálaráðum. Boðini verða endutikin dagin eftir, og tá boðar stjórin frá at hann ynskir at verða loystur úr starvi.

Sostatt er púra greitt:

- At undirritaði ikki hevur lagt seg út í hvør skuldi setast í starv, men einans sum kærumyndugleiki hevur ynskt at tryggja rættarstøðuna hjá uppsøgdu skiparunum, nú landsstýrið hevði longt fráfaringaraldurin til 70, og gjørt tað møguligt hjá longu uppsagdum starvsfólkum at halda fram til henda aldur

At Fíggjarmálaráðið tók eina ósakliga og løgfrøðiliga ógrundaða avgerð, tá ráðið í ansøgn við broytta starvsfólkapoltikkin noktaði uppsøgdu skiparunum at halda fram í størvunum

- At stjórin á Strandferðsluni ikki aktaði lógliga givin tænastuboð

At enda vil eg vísa tveimum uppáhaldum aftur.

Tá tað verður sagt, m. a. av løgmanni, at undirritaði álegði stjóranum at "annulera" setanina av seinna skiparanum, so er tað skeivt. Løgfrøðiliga er munur á at "annulera" ella ógilda og tað at afturkalla og fara undir eina uppsagnartilgongd.

Stjórin fekk fyrst lóglig tænastuboð um ikki at seta seinna skiparan, fyrr enn kæran var avgreidd. Tá hann ikki vildi lýða hesum boðum, fekk hann boð um at afturkalla setanina tvs. siga seinna setta skiparanum upp sambært almennu uppsagnarreglunum. Hetta er skjalfest.

Hevði stjórin gjørt soleiðis, sum honum var álagt í fyrstu boðunum, og ikki tilvitað roynt at sabotera kærumálsviðgerðina í Innlendismálaráðnum, so hevði ikki verið neyðugt við seinni boðunum. Tískil kann eisini spurnartekin setast við, hvørt stjórin í heila tikið hevði myndugleikan at seta seinna skiparan.

Tá løgmaður í SVF í gjárkvøldið púra ókritiskt førir fram, at undiritaði hevur lagt seg út í setanarmál á Strandferðsluni, so er tað skeivt. Eg havi ongantíð í míni virki sum landsstýrismaður havt innlit í, hvør hevur søkt og hvør er vorðin innstillaður til umrøddu størv.

At hetta málið endar á mínum borði kemst eina av, at eg veri kunnaður um samskifti millum fyrisitingina í Innlendismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og stjóran á Strandferðsluni, og fái soleiðis ábendingar um, at her er við at henda álvarslig fyrisitingarlig misstøk, fyri ikki at siga brot.

Hesar ábendingar verða seinni styrktar í væl grundaðari kæru til Innlendismálaráðið frá uppsøgdu skiparunum.

Eftir stendur so eisini spurningurin, hví tað var so alneyðugt hjá Fíggjamálaráðnum og stjóranum á Strandferðsluni at forða, at verandi skiparar á Smyrli sluppa at halda fram í sínum størvum, sum teir ábyrgdarfult hava røkt í áravís. Hesin parturin av viðgerðini er kjarnan í málinum og tað er her, at handfarðingin er løgfrøðiliga skeiv, men higartil hava hvørki fjølmiðlar ella løgmaður víst hesum áhuga.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.